UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, 28.02.2024
J.nr.: 23/25395

# Fylgiskjal 96

**Upprit um innkomnar viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)**

Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin) varð sent til hoyringar 26. januar 2024. Inn komu 94 hoyringarsvar frá borgarum, felagsskapum, kommunum, havnum og fyritøkum. Hoyringarsvarini eru løgd við lógaruppskotinum sum fylgiskjøl.

Afturat omanfyrinevndu hoyringarsvarum, sum Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur fingið, er hópin av viðmerkingum og sjónarmiðum komin fram á teimum níggju hoyringarfundunum, sum hava verið kring landið. Fleiri enn 600 fólk luttóku á hesum fundum. Viðmerkingar og sjónarmið, sum komu fram á hesum fundum, umboða væl tað, sum hoyringarsvarini eisini vísa á.

Hoyringarsvarini umrøða fleiri ymisk og fjøltáttað viðurskifti, bæði viðurskifti, sum eru viðgjørd í lógaruppskotinum og viðurskifti, sum – tó at tey knýta seg at spurningum um ferðavinnu í Føroyum – eiga at verða viðgjørd í aðrari lóggávu. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur viðgjørt øll hoyringarsvarini, men umrøður í hesum uppriti einamest viðurskifti og tema, sum ganga aftur í fleiri viðmerkingum og sum hava verið tikin fram á almennu hoyringarfundunum.

Flest allir hoyringarpartar fegnast um, at lógaruppskot, sum m.a. skipar gongd í haga, loksins er lagt fram fyri almenninginum. Fleiri vísa á, at uppskotið er eitt stig á røttu leiðini at skipa ferðavinnuna í Føroyum so burðardygt sum gjørligt og taka undir við uppskotinum. Samstundis vísa onnur á, at lógaruppskotið als ikki røkkur sínum endamáli, og at uppskotið átti at verið betri fyrireikað, áðrenn tað varð lagt fram.

*Ein burðardygg ferðavinna*
Tikið verður sum heild undir við endamálinum, men fleiri vilja verða við, at ferðavinna ikki kann vera burðardygg, tí sjálvur ferðafólkaflutningurin dálkar náttúru og umhvørvi. Hetta er í sjálvum sær rætt, men tað skerst ikki burtur, at ferðavinna *er* í Føroyum, og at tað er umráðandi at skipa hana so skynsamt og burðardygt sum gjørligt.

Fleiri hoyringarsvar gera vart við, at náttúran sjálv og vistfrøðilig burðardygd eigur at fáa størri tyngd í § 1, tí uttan náttúruliga burðardygd er eingin verulig burðardygd. Hugtakið *burðardygd* kann tykjast óneyvt í lógini, og hetta kann elva til misskiljingar. Fleiri vísa á, at fyrilitið fyri náttúruni má gerast greiðari í lógaruppskotinum, eins og nattúrufyrisitingin eigur at hava formligan myndugleika, tá ið ferðavinnuætlanir og farleiðir skulu góðkennast. Í hesum

sambandi vísa fleiri á, at tað er umráðandi at fara undir veruliga náttúruvernd – at telja fugl, at kortleggja náttúruna og at meta um beriføri (carrying capacity) í ymsum økjum. Onnur vísa á, at bøndur eru teir, sum kenna náttúruna í sínum øki best og duga best at skyna á, hvussu ferðslan uttangarðs skal stýrast ella avmarkast.

*Uttanríkis- og vinnumálaráðið* skal til hetta viðmerkja, at hesi viðurskifti í ávísan mun eru tikin til eftirtektar, og at lógaruppskotið er tillagað samsvarandi.

*Rætturin at ferðast frítt*
Flestu viðmerkingar, sum eru latnar Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, snúgva seg um ásetingina í § 3 um, at einum og hvørjum er frítt at ferðast við teimum avmarkingum, sum eru nevndar í ásetingini og í lógaruppskotinum sum heild. Yvirhøvur er tað í hoyringarsvarunum breið undirtøka fyri, at íbúgvar landsins skulu hava frítt at fara, og at gjaldportur eiga ikki at verða brúkt. Fyri nógv tykist hetta vera ein sjálvsagdur rættur og eitt framhald av verandi siðvenju. Onnur fegnast um, at rætturin at ferðast frælst í náttúruni verður staðfestur í lóg, at atgongdin at náttúruni fer at líkjast tí, sum er galdandi í grannalondunum, og at atgongd at náttúruni hevur avgerandi týdning fyri fólkaheilsuna, bæði sálarliga og kropsliga. Flestu halda eisini, at munur skal gerast á íbúgvum landsins og útlendskum ferðafólkum, og at tað er í lagi, at útlendingar rinda eitt gjald.

Umhvørvismálaráðið og onnur vísa hinvegin á, at tann fría atgongdin at náttúruni uttan nakran mismun - heldur ikki vegna tjóðskap ella bústað - og virðingin fyri náttúruni eru felags norðurlendsk virði, sum Norðurlond sum náttúruferðamál eru víðagitin fyri. Tí er tað avgerandi neyðugt fyri náttúruverndina, at lógaruppskotið ger greitt, at náttúran ikki skal kunna gerast til søluvøru, so at fagurvirðið og upplivingarvirðið í náttúruni kunnu vera kapitaliserað. Umhvørvismálaráðið mælir tí frá, beinleiðis ella óbeinleiðis, at gera sjálva náttúruna til søluvøru. Við at varðveita náttúruna sum felagstilfeingi kunnu almennu Føroyar tryggja, at náttúran verður atkomandi hjá øllum og varðveitt komandi ættarliðum.

*Uttanríkis- og vinnumálaráðið* tekur undir við hesum sjónarmiði, og tað er eisini tað, sum ásett er í lógaruppskotinum: Tað er ikki loyvt at taka pening fyri einans at ganga; tað skal vera ein tænasta uppií, um gjald verður kravt frá ferðafólki. Tað skal eisini viðmerkjast, at ásetingin í § 3 er grundleggjandi avmarkað av øðrum lógum og reglum, og at serliga ferðavinnuætlanirnar fara at gera greitt, hvussu ferðavinnan verður skipað – og avmarkað – kring landið.

At enda skal viðmerkjast, at ásetingin í § 3 einans er galdandi fyri ferðafólk, sbr. broyting í § 41 í girðingarlógini, sum ásetur, at avmarkingarnar fyri gongd í haga í teirri greinini ikki eru galdandi fyri íbúgvar landsins. Sostatt viðger Ferðavinnulógin ikki longur atgongdina hjá íbúgvum landsins, men einans hjá ferðafólki.

*Atburður*
Fleiri hoyringarpartar taka undir við at áseta reglur um atburð. Fleiri finnast at, at tað er loyvt at brúka bát á vøtnum, serliga har hagar hava avtalu um ávíst brúk av vøtnum. Hetta er tikið til eftirtektar, og ásetingin er strikað. Fleiri taka undir við, at tað einans er loyvt at taka hund við í hagan í landbúnaðarørindum, meðan onnur mæla frá slíkari áseting, m.a. tí at tað á ávísum støðum er siðvenja at hava hund við sær í hagan. Mótmælini eru tikin til eftirtektar, og ásetingin er strikað. Í hesum sambandi er eisini viðkomandi at nevna, at galdandi reglur um, at loyvt er at hava hund í bandi á bygdagøtunum, eru varðveittar, tí ásetingarnar í girðingarlógini, sum snúgva seg um hesi viðurskifti, verða ikki strikaðar kortini.

Í nøkrum hoyringarsvarum verður fegnast um, at bóndin hevur rætt at vísa burtur fólki, sum ber seg fyrilitarleyst at ella er ognini at skaða ella til ampa, men víst verður á, at bóndans húski má hava sama rætt at vísa fólki burtur sum bóndin. Hetta er helst ikki ein trupulleiki, men tá krevst, at talan er um ein, sum hevur sama legitimitet sum bóndin. Ein ferðavinnufyritøka heldur harumframt, at ferðaleiðarar skulu hava sama rætt at burturvísa fólki. Tað er ikki vanligt at áseta ein privatan burturvísingarrætt, og tí verður mett rættast, at hesin er avmarkaður til tann, sum beinleiðis varðar av ognini.

*Handilslig ferðavinna, ræðisrættur og ognartøka*
Nógvar viðmerkingar eru til § 5 um handilsliga ferðavinnu, serliga saman við § 3, tí mett verður, at hetta tekur ræðisrættin og ognarrættin frá bóndanum. Onkur mælir til, at hetta kundi verið bøtt við einum lágum gjaldi, sum hagin kann fáa fyri hvørt ferðafólk, og at landsstýrismaðurin skal góðkenna upphæddina.

Til hetta skal Uttanríkis- og vinnumálaráðið viðmerkja, at mett verður ikki, at talan er um at taka ræðisrætt ella ognarrætt frá nøkrum. Við ferðavinnuætlanini, sum bóndin hevur ávirkan á, ber til at skipa gongdina soleiðis, at hon ávirkar annað virksemi sum minst, eins og handilslig ferðavinna einans kann fara fram eftir avtalu við tann, sum varðar av jørðini. Tað er ikki loyvt at nokta fyri virksemi eftir § 5 ella einans at gera avtalu við ávísar fyriskiparar, og hetta er í samsvari við tað, sum er galdandi í grannalondum okkara. Hetta verður í stóran mun longu gjørt í dag, og tí er ikki talan um stóra broyting frá galdandi støðu. Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir ikki, at talan er um ognartøku, m.a. tí at inntrivið er javnt galdandi fyri øll, og tí at inntrivið má metast at vera veikt. Víst verður annars til almennu viðmerkingarnar í lógaruppskotinum, sum umrøða ognartøku.

Viðv. uppskotinum um, at hagin kann fáa eitt lágt gjald fyri hvørt ferðafólk skal einans viðmerkjast, at hetta er við til at kapitalisera náttúruvirði, og at tað ikki er í samsvari við yvirskipaða endamálið við lógini.

*Ferðavinnuætlanir, serstakar nevndir og gjaldið, sum verður latið kommununum*
Flestu kommunur, sum hava latið hoyringarsvar viðmerkja, at tað verður trupult at gera ferðavinnuætlanir lidnar til tíðina. Til hetta skal Uttanríkis- og vinnumálaráðið viðmerkja, at tað sjálvandi verður byrjað í smáum, og at talan í fyrstu atløgu sjálvandi er um einfaldar ætlanir, sum eru ein byrjan til ta samlaðu ætlanina fyri kommununa. Fleiri kommunur hava longu gjørt ávegis ætlanir, sum væl kunnu brúkast sum grundarlag. Í fyrstu atløgu er umráðandi at eyðmerkja, hvar fólk kunnu ferðast, hvar tey ikki kunnu ferðast, og hvar serligar umstøður gera tað neyðugt at skipa viðurskiftini. Tað er eisini sjálvsagt, at í kommunum við fleiri bygdum verður arbeitt við mest árendu støðunum fyrst. Um havt verður í huga, at ferðavinnuætlanir ivaleyst skulu endurskoðast, broytast, víðkast ella smalkast við jøvnum millumbilum, metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at flest allar kommunur, annaðhvørt einsamallar ella saman við aðrari kommunu, hava stundir at gera eina einfalda ferðavinnuætlan innan fyri ta ásettu tíðina.

Fleiri viðmerkja, at tað er órímiligt at lata landsstýrismannin góðkenna ferðavinnuætlanina. Til hetta skal Uttanríkis- og vinnumálaráðið viðmerkja, at endamálið er at tryggja, at ætlanirnar eru í samsvari við yvirskipaða endamálið um burðardygd í løgtingslógini.

Ivi hevur verið um, hvussu serstaka nevndin skuldi veljast, og ásetingin er tí broytt soleiðis, at nevndin, sum bara verður vald í bygdum við 300 íbúgvum ella færri, verður vald á grannastevnu. Hetta forðar ikki fyri, at kommunur velja at samstarva við aðrar kommunur, eins

og hetta heldur ikki forðar fyri, at (aðrar) nevndir verða skipaðar tvørtur um bygdamark, um tað tænir málinum.

Flest allar kommunur hava viðmerkt, at gjaldið, sum kommunurnar fáa, er alt ov lágt. Til hetta skal Uttanríkis- og vinnumálaráðið viðmerkja, at gjaldið er hækkað munandi, og at upphæddin til kommunurnar tí eisini er hækkað munandi. Samstundis er ásett, at kommunurnar av hesum gjaldi kunnu fíggja kostnaðin av at gera ferðavinnuætlanina, eins og kommunurnar av gjaldinum skulu fíggja kostnaðin hjá serstøku nevndini, hagastýrum og festarum av at gera ferðavinnuætlanir (saman við kommununi).

*Farleiðir og gøtur*
Fleiri hoyringarsvar vísa á, at tað verður trupult hjá kommunum at halda bygdagøturnar og at gera nýggjar farleiðir. Summi halda tað vera landsuppgáva, og onnur at tað er betri um bøndur gera nýggjar farleiðir og fíggja hesar við gongugjøldum. Nógvar viðmerkingar eru um, at inntøkurnar frá ferðagjaldinum neyvan røkka til at gera farleiðirnar, ið tørva.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal fyrst viðmerkja, at gjaldið, sum verður latið kommunum, er hækkað, og at tað tí er størri fíggjarlig orka at gera farleiðir og gøtur. Síðani skal viðmerkjast, at alt eftir umstøðunum á staðnum er ikki neyðturviliga talan um veruliga steinsettar gøtur, men heldur um pelar, varðar o.tíl., sum vísa ferðafólkum á leið. Inntrivið í náttúruna skal vera so lítið sum til ber, og tá ikki vist, at talan er um kostnaðarmiklar gøtur. Vísast skal harumframt á, at kommunurnar frammanundan hava skyldu til, sbr. reglugerð um varðagøtur frá 1940, at halda bygdagøturnar, og at hetta sostatt ikki leggur eina nýggja uppgávu á kommunurnar.

Við meginregluni um, at tað almenna fíggjar gøturnar, so ber ikki til at taka gjald frá ferðafólki fyri einans at ganga. Tað er heldur ikki í samsvari við lógaruppskotið annars.

*Skilhaldsreglur og trygd*
Summi vísa á, at skilhaldsreglurnar kunnu seta óneyðugar avmarkingar fyri føroyingar, sum fara burtur í haga, meðan onnur halda, at tað við hesum ásetingum verður ógjørligt at røkja hagarnar.

Til hetta skal Uttanríkis- og vinnumálaráðið fyrst viðmerkja, at skilhaldsreglurnar fyrst og fremst eru ætlaðar ferðafólki, og at rættur føroyinga verður skipaður í aðrari lóggávu. Í hesum sambandi hava eisini fleiri hoyringarpartar víst á, at tað átti at verið eitt krav, at allir ferðaleiðarar vóru føroyingar. Til hetta skal stutt viðmerkjast, at tað ber ikki til at krevja ávísan tjóðskap, m.a. tí at norðurlendingar hava frítt at ferðast og arbeiða í øðrum Norðurlondum.

Harumframt skal viðmerkjast, at reglurnar – av tí at tær fyrst og fremst eru galdandi fyri ferðafólk – ikki forða bóndum og teimum, sum annars varða av jørðini, at røkja landbúnaðarviðurskiftini. Ásetingarnar verða tí ikki broyttar.

*Ólógligar forðingar*
Ásetingin um forboð fyri ólógligum forðingum hevur eittans endamál, og tað er at forða fyri, at tað, sum sambært lógini er loyvt, ikki verður steðgað av ólógligum forðingum. Hetta merkir fyrst og fremst, at forðingar, sum verða settar upp, hava eitt lógligt endamál, t.d. at hava seyðin á ávísum stað. Forboðið snýr seg einans um ólógligar forðingar; lógligar forðingar eru loyvdar. Ásetingin verður tí ikki broytt.

*Náttúrugjald*
Fleiri halda at heitið *náttúrugjald* er misvísandi, og at hetta heitið m.a. kann káva útyvir grønvasking, tí gjaldið fer ikki til at bøta um árinið av ferðavinnu á náttúruna. Hetta er tikið til eftirtektar, og heitið er broytt til *burðardygdargjald*. Onkur mælir til, at gjaldið verður sett í grunn, har kommunur o.o. kunnu søkja um stuðul til ferðavinnumenning o.tíl.

Onkur tekur undir við, at gjaldið verður kravt, tá ferðafólk koma til Føroya, meðan onnur meta, at eitt gjald við komu ella gjald á ferðaseðilin fer at minka um kappingarførið. Gjaldið átti tí heldur at verið lagt á gistingar, tí tað er bæði rættvísari og einfaldari at krevja inn.

Upprunaliga varð skotið upp, at gjaldið varð lagt afturat ferðaseðlakostnaðinum. Hetta er tøkniliga trupult, og ásetingin er tí broytt soleiðis, at tey, sum flyta ferðafólk til Føroya (flogfeløg og ferðamannaskip) og havnir, sum taka ímóti cruise-skipum og stuttleikabátum, skulu krevja gjaldið inn og síðani avrokna til TAKS.

Einstakir hoyringarpartar meta, at tað er skeivt at leggja fult burðardygdargjald, umframt vanliga ferðagjaldið, á ferðandi við ferðamannaskipum (cruise-skipum), tí hesi eru so lítið í landi og sjáldan uttan fyri bøgarðarnar. Eitt ov høgt gjald kann hava við sær, at ferðamannaskip fara at velja Føroyar frá, tí tað verður ov kostnaðarmikið.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur broytt innkrevjingina soleiðis, at tey, sum flyta fólk til Føroya, skulu krevja gjaldið inn vegna landið. Gjaldið verður tó ikki lagt omaná ferðaseðlakostnaðin. Gjaldið verður heldur ikki lækkað fyri ferðafólk við cruise-skipum.

Áseting fær gildi 1. oktober 2024, so stundir eru at skipa viðurskiftini.

*Gjaldið til kommunurnar*
Fleiri halda at gjaldið er ov lítið til at røkka til øktu útreiðslurnar hjá kommununum. Hetta er tikið til eftirtektar, og gjaldið er hækkað munandi.

Áseting fær gildi 1. oktober 2024, so stundir eru at skipa viðurskiftini.

*Býtið av gjaldinum*
Fleiri hoyringarpartar vísa á, at tað er ógreitt, hvussu gjaldið verður býtt millum kommunurnar. Til hetta skal Uttanríkis- og vinnumálaráðið viðmerkja, at býtið nú er greinað soleiðis, at 40% av gjaldinum verður býtt javnt millum allar kommunur, meðan hini 60% verða býtt eftir tí trýsti, sum ferðavinnan leggur á eitt øki. Sostatt verða tað kommunurnar við lutfalsliga flest ferðafólkum, sum fáa lutfalsliga mest av gjaldinum.

*Kunngerðarheimildir*
Í nógvum hoyringarsvarum verður ført fram, at kunngerðarheimildir landsstýrismansins miðsavna stýringina av ferðavinnuni og hava við sær, at ávirkan og vald verður flutt úr útjaðaranum til miðstaðarøkið og til Havnar. Til hetta skal stutt viðmerkjast, at nevndu heimildir eru fækkaðar í tali, men at ávísar ásetingar í lógini eru soleiðis háttaðar, at neyðugt er við kunngerðarheimild.

*Gildiskoma*
Fleiri hoyringarpartar vísa á, at neyðugt er at hava eina hóskandi skiftistíð. Hetta er partvíst tikið til eftirtektar, og §§ 14-15 fáa tí ikki gildi fyrr enn 1. oktober 2024.

*Broytingarnar í girðingarlógini*
Fleiri hoyringarpartar hava víst á, at tað fer at hava stórar avleiðingar við sær fyri vanligt landbúnaðarvirksemi, um ætlaðu broytingarnar í girðingarlógini verða framdar. Hetta er tikið til eftirtektar og uppskotið broytt samsvarandi.

*Aðrar viðmerkingar*
Aftur at omanfyrinevndu viðmerkingum vísa fleiri hoyringarsvar á aðrar trupulleikar og onnur viðurskifti, sum á onkran hátt knýta seg at ferðavinnuni:

Í sambandi við fugl verður víst, á, at bæði dronuflúgving og sigling við skjóttgangandi bátum nær fuglabjørgum er ein trupulleiki.

Víst verður á, at tað standast nógvir trupulleikar av leigubilum og húsvognum, og at tað átti at verið loyvt privatum at tikið gjald fyri parkering á privatum øki, eins og í øðrum londum.

Víst verður á, at vegakervið manga staðni ikki megnar ta nógvu ferðsluna og ferðsluruðuleikan, sum ferðavinna hevur við sær.

Víst verður á, at tað skuldi borið til at nokta fyri rossum og lendisakførum í økjum, sum ikki tola tunga ferðslu.

Víst verður á, at tey nógvu summarhúsini, sum eru kring landið, forða fyri, at ung fólk, sum vilja búgva á staðnum, kunnu tað.

Víst verður á, at tað serliga í útjaðaranum og á útoyggj er ein trupulleiki, at tey, sum hava jørðina á hondum, ikki búgva á staðnum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal til hetta viðmerkja, at hetta sjálvandi eru viðurskifti, sum eiga at verða tikin upp, men at talan er um viðurskifti, sum eru ella eiga at verða skipað í aðrari lóggávu.

Jóanna Djurhuus
ráðgevi